## DAGSINS MEINING

# Jólaútgávur

Eingin kann siga, at vit føroyingar ikki eru produktivir, tá talan er um at geva út bøkur og fløgur. Hetta kemur so serstakliga til sjóndar, tá jólini nærkast. Og eins og undanfarin ár eru jólaútgávurnar nógvar. Fløga oman á fløgu, og bók oman á bók. Tað fer ikki dagur nú undan jólum, at miðlarnir ikki siga frá nýggjum og eisini áhugaverdum útgávum. Sumt av hesum er afturvendandi tvs. at tað eru somu fólk, sum geva út bøkur og fløgur ár um ár.

Millum mongu nýggju bókaútgávurnar eru eisini tvær, sum Sosialurin gevur út.

Tann eina er afturvendandi. Tað er bókin við tekningunum hjá okkara teknara, Óla Petersen. Bókin er ein lýsing av nógvum av tí, sum er farið fram í árinum, sæð við eygunum hjá teknaranum. Men nakað serligt er við hesi bókaútgávuni í ár. Skemt 2003 er nevniliga eitt slag av eini jubileumsbók. Hon er tann fimtanda í røðini. Ikki kann sigast annað enn, at teknarin hevur verið produktivur og áhaldandi. Tríggjar ferðir um vikuna í samfull 15 ár hevur teknarin á Skála sent sínar tekningar til blaðið á Argjum, sum hevur prentað tær á baksíðuni. Tá talan er um føroyska bókaútgávu má sigast, at her er talan um føroyskt bókamet, tá hugsað verður um eina føroyska fram-haldsrøð.

Samstarvið millum blað og teknara byrjaði í 1989, tá blaðið prentaði teknirøðina "Stavnur og Snar", sum Óli P hevði gjørt. Og við hesum samstarvinum fór so eisini startskotið av til ta fyrstu bókina við baksíðutekningum, sum fekk heitið Skemt. At tað er annað enn bara skemt vita vit, tí talan er eisini um eina álvarsliga endurspegling av ikki minst politisku søgutilgongdini her á landi øll hesi mongu árini.

Nú talan er um eina jubileumsbók verður eisini gjørt eitt sindur burtur úr. Blaðið hevur heitt á trý fólk um at velja út tær "15 bestu" øll hesi árini. Tvs. tað sum tey halda vera ta bestu tekningina hvørt árið. Síðani eru allar hesar tekningar litlagdar. Hetta er eisini gjørt fyri at vísa lesarum og áhugaðum, at møguleikar eru at fáa allar tær 2500 tekningarnar hesi 15 árini í liti. Er onkur tekning, sum fólki dáma serstakliga væl kunnu tey seta seg í samband við blaðið, og vit fáa professionell fólk at leggja lit á. Nú tann fimtanda bókin er komin í bókabúðirnar er teknarin farin undir at gera sínar fyrstu tekningar til Skemt 2004, sum kemur út til næstu jól. Vit skulu á hesum stað takka Óla P fyri hansara dygdararbeiði og áhaldni. Vónandi verða tekningarnar partur av blaðnum í mong mong ár aftrat.

Hin bókaútgávan hjá blaðnum er bók um Stalin, sum rithøvundin Hanus Kamban hevur skrivað. Í bókini er greinarøð, sum Hanus Kamban hevði í Sosialinum fyrr í ár. Hanus, sum telist millum okkara frægu rithøvundar, hevur í mong ár verið gestaskribentur á blaðnum við eini ørgrynnu av áhugaverdum og viðkomandi greinum og hugleiðingum. Vit halda evnið hann hevur valt at skriva um er sera viðkomandi fyri okkara tíð eisini, har mannarættindini mangastaðni kring heim verða vanvird. Bókin er so avgjørt eitt gott íkast til orðaskiftið um demokrati og mannarættindi. Vit vilja takka høvundanum fyri at hava loyvt okkum at geva út avbera áhugaverdu og vælskrivaðu greinarøð hansara um Stalin.

Tað skal eisini vera okkara vón, at blaðið við hesum báðum útgávum hevur verið við til at ríka føroyska bóka- og mentanarheimin.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Høgni og Hyacinth

**Ikki hvørjum beskorið at vera útvaldur at umboða rættvísina, men fínt skal tað vera.**

**Bjarni Djurholm**



Síggi í bløðunum Høgna Hoydal (HH) ávara móti Fólkaflokkinum - ja, heitt verður á fjøðlmiðlar og onnur, um at hava vakið eyga við landsstýrinum, soleiðis, at illgrunasamt virksemi ikki sleppur at henda áðrenn nýggj samgonga er skipað.

Og HH heldur fram, »at Tjóðveldisflokkurin var eitt slag av garanti fyri reinleika í landsstýrinum«.

At tað, sambært HH og tjóðveldinum, skuldi falla teimum í lut at umboða tað góða - tað er ikki hvørjum beskorið. Men vissan um, at teir ikki seta sítt ljós undir skeppuna, eigur so at sissa tey fjálturstungnu.

Henda sjálvlovprísanin, hetta pátikna treytaleysa nærlagni og klokkukláru mannagongdirnar munnu tó gera lív teirra strævið, soleiðis at liva í kroniskari tvístøðu, alsamt at vera tvífyri ikki at siga tvískinningar.

**Fínt skal tað vera**

Hesin leiklutur HH og tjóðveldismanna gevur hugsamband til sjónvarpsrøðina »Fínt skal tað vera«, har Hyacinth Bucket hevur óendaliga tráan eftir at verða beundrað og accepterað. At blanda seg millum tey stóru og betra slagið, at byggja sín samleika á ein plastikkveruleika, sum nærkast tí tragikomiska.

Men kanska er atferðin hjá HH og tjóðveldinum at fjala upprunan og fortíðina, eins og hjá Hyacinth, har veruligi samleikin er Onslow og systurin, sum als ikki samsvarar við pseudotilveruna hjá Hyacinth.

Eins og Hyacinth, so fær tjóðveldið hábrøgd, tá flokkurin verður konfronteraður við upprunan og veruleikin verður avdúkaður.

Tí er umráðandi fyri HH og tjóðveldið at pynta seg við læntum fjaðrum og serfrøði og billa fólki inn, »at flokkurin var eitt slag av garanti fyri reinleika í føroyskum politikki«.

Fínt skal tað vera. Eg meini tað.

# Til etiska ØSSta Winthereig

**Jørgen Niclasen**
*løgtingsmaður*



Síggi í lesarabrævi hjá Øssuri Winthereig, at hann leggur meg undir at vera kelda í bókini, har hann saman við øðrum roynir at sverta løgmann. Tí hesa viðmerking.

Varð av Øssuri spurdur, um hann kundi tosa við meg um lagnudagin, tá eg legði frá mær sum landsstýrismaður. Játtaði og bleiv spurdur um hendingarnar. **Var als ikki spurdur um fortíðina hjá løgmanni.**

Hóast eg spurdi, hvat ætlanin var, var svarið bert, at hann kom at skriva grein til bløðini ella okkurt annað, kanska eina bók. Fekk einki at vita um, at ætlanin var at skriva eina bók, sum hevði til endamáls at sverta fyrst og fremst løgmann. Hann spurdi heldur ikki um nógvar av leysu pástandunum um undirritaða, sum journalistarnir borðreiða við í bókini.

Eftir stendur, at Høgni Hoydal alment boðaði frá, at Tjóðveldið einki hevði við bókina at gera. Men tá bókin kom út stóð svart upp á hvítt, at Høgni Hoydal og Torbjørn Jacobsen standa sum keldur í bók, hvørs endamál er at sverta fólkafloksmenn, meðan høvuðspersónurin, løgmaður, ikki varð spurdur um nakað.

Jounalistiskur etikkur, »eg meini tað«.

PS. Havi tosað við tvær aðrar keldur í bókini, sum journalistanir hava tosap við. Hvørgin hevði fingið ta fatan, at talan var um eina bók.

# Ríkisfelagsskapurin heimsins besta skipan

## 4. partur

**Kaj Leo Johannesen**
*Sambandsflokkurin*



Eingin er enn komin við einum boði uppá eina betri skipan, enn hana vit hava í ríkisfelagsskapinum, tað er heldur ikki so løgið.

Í nýskipanaruppskoti Sambandsfloksins verða Føroyar roknaðar sum partur av einum ríki, ið er samansett av trimum javntstillaðum londum.

Fyri at kunna vera í einum ríkisfelagsskapi, er neyðugt at nøkur málsøki eru felags fyri alt ríkið. Hesi eru: Kongshúsið, Grundlógin, Uttanríkismál, Verjumál, Gjaldoyra og Rættarskipanin.

Tað ber ikki til at hava eitt ríki við til dømis tveimum kongum, tveimum grundlógum og tveimum verjum.

Hesi felags málsøki eru "garðurin" rundanum ríkið. Tað eru hesi, sum gera, at vit kunnu tosa um eitt ríki, og tey skulu ikki kunna yvirtakast.

Afturat hesum, eru onnur málsøki, sum í dag eru felagsmál fyri alt ríkið, men sum heimastýrið skal hava møguleika til at yvirtaka.

Tað skal tó ikki kunna bera til at yvirtaka hesi málsøki, uttan so, at gjaldskylda eisini fylgir við yvirtøkuni. Tann sum skal valda, skal eisini gjalda.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.


## VIÐMERKINGAR

# Nær fór løgmaður frá?

**Eilif Samuelsen**



Tað kann stórliga undra, at slíkt hóvasták er gjørt burtur úr, at løgmaður "segði seg frá", skrivaði út val og sendi landsstýrismenninar hjá Tjóðveldinum til hús, og um tað var gjørt í einum andadrátti ella í fleiri.

Fyri tað fyrsta, so kann ein løgmaður ikki siga seg úr starvi við brestin, og tað hendir heldur ikki nøkur umbroyting við honum frá at vera løgmaður og til at vera fjallmaður ella nakað annað í somu løtu, sum hann boðar frá, at hann sigur seg frá. Fyri tað næsta, so skal hann fylgja reglunum í Stýrisskipanarlógini og biðja um at verða loystur úr starvi. Og tað var júst tað, hann gjørdi, tá ið hann handaði løgtingsformanninum skrivið við umbøn um at verða loystur úr embætinum.

§ 29 í Stýrisskipanarlógini sigur: *"Loystur skal verða úr embæti løgmaður ella landsstýrismaður, ið biður um tað. Løgtingsformaðurin loysir løgmann úr embæti og løgmaður loysir landsstýrismann úr embæti."* Og tað var tað, sum tingformaðurin gjørdi kl. 15.30. Løgtingsformaðurin kann sostatt ikki so frægt sum nokta at loysa løgmann úr embæti.

Hvussu kann ein av fedrunum at Stýrisskipanarlógini, sum í Sosialinum í gjár var spurdur um hesa miklu søk, viðganga, at hann gjørdist skakkur, tá ið hann hoyrdi raðfylgjuna, sum løgmaður handaði tingformanninum brøvini í. Og hvussu kann hann siga: *"Tá ið løgmaður hevur sagt seg sjálvan úr starvi, so situr hann bara sum leiðari fyri einari starvsstjórn..... Frá tí sekundi, hann hevur lagt frá sær, er hann ikki løgmaður við fullum heimildum longur, og tí hevur hann í prinsippinum heldur ikki rættin at skriva út nýval."*

Er orðingin í Stýrisskipanarlógini ikki eintýdd, ella kann hon tulkast?

Radikala Føroyar:

# Ein dreymur um frílyndi í Føroyum í dag

**Kim Simonsen**



Mál sum abort, rúsdrekka, samkynd og alt vanligt frílyndi eru í dag frammi. Vit kunnu tosa um eitt neyðugt virðiskjak. Herfyri var journalisturin Brynhild Thomsen á Danmarks Radio og tosaði um støðuna viðvíkjandi abort í Føroyum í kendu sendingini Silikone á P1. Politiken hevur havt áhuga í føroyskum meiningum og serliga hava politikarar frá Det Radikale Venstre funnist at vantandi føroyskum tolsemi.

Samanumtikið er tað, sum um tað mest eru tey ungu í Føroyum, ið vilja røra við tey eldfimu málini í samfelaginum í dag, ið vit hava sæð við stórum politiskum fundi, ið kanska druknaði í skugganum av einari kendari bók og av Bryggjuni. Kanska valagitatiónin fer at taka nøkru av hesu málum fram.

Reint politiskt hava Miðfloksfólk og tí mótstøðan móti t. d. abort, liberalisering av rúsdrekkalógini og lógarøkinum fyri tey samkyntu sínar talsmenn, sum entá hava sitið sum avgerandi og hin tyngst vigandi og tí hin avgerandi politiski maktfaktorurin í áravís. Hesi vilja blanda verðslig mál við trúðarligar tulkingar av nútíðarsamfelaginum út frá serligum tulkingum av kristindóminum.

Longu tá Amerika varð til sum vit kenna tað í dag varð amerikanska grundlógin eitt hitt størsta framstigið í vesturlenskari modernaðari søgu, tí har skræddu amerikumenn, hjálptir av fronsku upplýsingarheimspekini, trúgv og politik sundur, og kirkjuna og statin. So við og við varð henda skipan, ið tryggjar sekulera fólkaræðið best, adopterað kring heimin. Fyrst í Frankaríki og sum tíðin leið í Danmark, men við undantakinum av at í Danmark og tí í Føroyum var og er enn ein statskirkja, ið mangan er sera óheppi. Lond sum Týskland og Svøríki hava sum USA og Frankaríki ikki longur eina statskirkju.

Men sum við øllum vektum, eisini henni hjá Justitiu, er eingin javnvág um eingin mótvekt er á politiska vígvøllinum. Flokkar sum Javnaðarflokkurin og Tjóðveldisflokkurin hava nógv frílynt fólk, ið stundum nærum eru mentunarradikal, men Tjóðveldisflokkurin hevur í nógv ár selt sína moralsku æru til ein fundamentalistiskan meiriluta og ein ivasaman »holumannaliberalistiskt« partafelag kallað Fólkaflokkurin. Javnaðarflokkurin er eftir Dammin og 80ini, nærum ævigani útlagstur sum andstøðuflokkur, stættarstríðið fangar ikki longur fólk á sama hátt. Sambands- og Fólkaflokkurin tykjast hava lítlan áhuga í modernaðum málum. Tað er sum um flokkar ikki duga at síggja, ella at liva í nýggja politiska veruleikanum í dag.

Eftir er so Sjálvstýrisflokkurin, ið Gallup spáar at detta út við næsta val. Hesin flokkur reypar av at samarbeiða við Det radikale Venstre, ið er hin mest kontroversielli flokkurin mangan á frílyndisøkinum í Danmark, hesi hava homoseksuellar politikarar og fleiri »útlendskar« danir enn nakar annar flokkur sum t. d. Naser Kahder, men eg síggi ongan mentunarradikalan anda yvir føroyska Sjálvstýrisflokkinum. Det Radikale Venstre er flokkur, ið hevur høgt til loftið og setir mangan ein dagsordan innan mentan, gransking, kjak og hevur nógv fleiri lærdar veljarar í Danmark enn aðrir flokkar. Eingin flokkur hevur sitið í fleiri samgongum í 20 øld enn hesin lítli flokkur og eingin hevur ávirkað donsku mentanina meiri enn tey radikalu. Tað stendur tí ein stór virðing um Det Radikale Venstre bæði millum høgravend og vinstravend (Enhedslisten og Dansk Folkeparti dáma nærum ongan, so tey hugsi eg ikki um) men føroyska Sjálvstyrisflokkin veit føroyski veljarin ikki nógv um, hesi vilja bert hóra undan. Flokkurin hjá livibreyðspolitikarunum. Men kanska varð best um hesin flokkur andaðist við komandi val. At vera føddur í 1906 er ein høgur aldur og seniliteturin hevur nú kanska innfunnið seg í flokkinum.

Sum eg síggi tað, er tí brúk fyri einum lítlum flokki á miðuni í Føroyum í dag, sum tordi at vera ein total anti-virus móti fundamentalismuni og intoleransuni í Miðflokkinum, sum tordi at umboða frílyndi og eina kosmopolitiska og visionera kós, ið talaði til fólk við áhuga innan t. d. mentan, gransking, list, tónleik og ein flokkur fyri intellektuell sum eru heimleys innan nationalistiska rákið í dag. Ein flokkur fyri modernaða føroyingin, sum vil arbeiða á miðuni fyri sjálvbjargni á einum ikki nationalistiskum, men kosmopolitiskum botni. Føroyum væntar ein mentanarradikalan flokk og ein triða veg í dag, sum t. d. fekk eini tvey tingfólk, ið tordu at sett seg á øki sum familju og sosialpolitikk, mentan og undirvísing v. m. Ein flokkur fyri tey mangan forfjónaðu intellektuellu, fyri listafólkini, humanistar, ateistar og frítonkjarar, samkynt, útisetarnar og útlendingar í Føroyum og fólk sum vilja fremja ein nýggjan anda. Stutt sagt Radikalu Føroyar, ið slapp okkum av við eina øld av innistongdari intoleransu, ein flokkur sum bæði var ein mótvekt og ein nýggj byrjan í mun til útheimin og ES, ið bæði vildi og tordi at hyggja út yvir tjóðina, loysing og samband, vinstru og høgru. Ein flokkur sum kundi savnað mentaði og skil- og andborin fólk í Føroyum í dag um t. d. at verja mannarættindi hjá millilutum. Ein flokkur, ið var sum ein eldkúla av moderniteti, ið kundi sent Føroyar við 380 km um tíman móti framtíðini.

# Ja, okkurt skal tað eita Jákup Sverri Kass

**Áki Andreasen**



Tað er ikki sørt margháttligt, ja fyri ikki at siga skemtiligt, at lesa grein hjá Jákup Sverra Kass, hann hevur í bløðunum 09/12/ 2004.

Við yvirskriftini »Sjálvstýriskyndilin má ikki slókna« - vil Jákup Sverri verða við, at Sjálvstýrisflokkurin er trygdin fyri, at sjálvstýristilgongdin heldur fram.

Nú veit eg ikki, hvussu tú hevur fylgt við í politisku gongdini, men øll vita, at Sjálvstýrisflokkurin við Kára P. Højgaard á odda, tíðliga og síla hava funnist at og hótt einhvønn tanka sum skal bera á sjálvstýrisleið.

**Orð og gerðir….**

Satt at siga so kemur hetta ikki óvart á. Sjálvstýrisflokkurin hevur hetta valskeiðið latið seg brúkt av sambandsmonnum sum Óla Breckmann, Bjarna Djurholm og Fólkaflokkinum, sum hevur lagt seg tvøran, tá mál sum stuðla undir fullveldisgongdina skuldu fáast av bakkastokki.

Tingmaður Sjálvstýrisfloksins hevur av sonnum verið ein meinbogi fyri samfelagsligum framburði og tá tøk skuldu takast á sjálvstýrisleið.

Hetta er veruleikin, Jákup Sverri - so tað hjálpir lítið at tú roynir at siga veljarunum eitt, sum er í fullkomnari andsøgn við rikna politik Sjálvstýrisfloksins í samgonguni, sum Annfinn Kallsberg segði upp 05.12.2003.

Tí orð og gerðir mugu fylgjast at, tað skuldi tú skrivað tær aftan fyri oyra.

**Brendar brýr**

Jákup Sverri vil staðfesta, at einki pláss verður fyri Tjóðveldisflokkinum í einum komandi landsstýri, og: »Við at brenna brýr byggja vit onki land« …Nú skal tað staðfestast, at Tjóðveldisflokkurin ikki hevur brent nakrar brýr. Um Jákup Sverri veruliga meinti nakað við tað, hann skrivar og sigur Sjálvstýrisflokkin standa fyri, so stuðlaði hann tilmælinum hjá Tjóðveldisflokkinum um at gera broytingar í samgonguni, men tað vildi Fólkaflokkurin sum kunnugt ikki - og valdi heldur at koyra samfelagið út í eitt val í úrtíð.

Um pláss verður fyri Tjóðveldisflokkinum ella ikki - tað kemur tíðin eftir altíð at vísa, flokkurin hevur sum skilst ikki avskrivað nakran samgongumøguleika - tað hava hinir flokkarnir heldur ikki; uttan ein - Sjálvstýrisflokkurin, so hann brendi ta fyrstu brúnna….harmiligt Jákup Sverri

**Viljin og áræði**

Viljin hjá Sjálvstýrisflokkinum hevur verið torførur at fingið eyga á í valskeiðnum, sum Anfinn Kallsberg og Fólkaflokkurin so brádliga vildu burturúr. Men um Jákup Sverri kann vísa á okkurt sum lýsir viljan hjá hansara flokki er hann vælkomin at gera tað.

Hvat áræðinum viðvíkur, so er tað nakað sum Sjálvstýrisflokkurin sjáldan hevur kunna breggjað sær av. Eg kann ikki minnast, at nakar tingmaður floksins - heldur ikki tá Jákup Sverri sat sum tingmaður, hevur tikið ein djarva avgerð, sum ber bráð av einum farra av áræði.

Tjóðveldisflokkurin er borganin fyri fullveldistilgongdini og politiskum áræði

Tað er einki nýtt, at Tjóðveldisflokkurin er flokkurin, sum er trygdin fyri at fullveldistilgongdin kann halda fram, tað veit hvørt mansbarn í Føroyum. Sat flokkurin ikki í Tinganesi hesi seinastu árini, var okkara land langt síðan avreitt inn í danska ríkið fyri vel.

Politiska áræðið hevur alstóran týdning, serliga tá ein flokkur sum Tjóðveldisflokkurin bjóða føroyingum ræði í sínum egna landi; og ferð aftan á ferð hevur Tjóðveldisflokkurin víst hetta áræðið í verki, bæði tá talan hevur verið um egin landsstýrisfólk og politiskar avgerðir. Seinast tá flokkurin boðaði frá, at álitið á Anfinn Kallsberg var fokið, einfalt tí at maðurin ikki dugdi sær hógv tá talan var um nýtslu av løgmansstarvinum.

Valið 20 januar 2004 hevur avgerandi týdning - týdning fyri fullveldistilgongdina, samhaldsfasta vælferðarsamfelagið, frælsa vinnulívið, verka- og fiskimannin, og álitið á politisku skipanina í Føroyum.

Gevið Tjóðveldisflokkinum álitisváttan á valinum 20. januar 2004